Búskapur og vinna:
## Uppsagnir

Norska útflutningsráðið hevur gjørt av at siga einum fjórðingi av starvsfólkunum úr starvi. Tað ber í sær, at 25 fólk noyðast at finna sær okkurt annað at gera.

Fyribils er avgjørt at koyra 25 starvsfólk á skrivstovunum í Oslo til hús, men leiðslan hevur eisini boðað frá, at hon fer at leita eftir sparingum á teimum 39 skrivstovunum, sum útflutningsráðið hevur uttanlands.

## Heldur Evropa

Búskaparfrøðingarnir í Danske Bank vænta, at tey evropeisku partabrøvini fara at standa seg betur á marknaðinum enn tey amerikansku. Orsøkin er, at vinningurin hjá teimum amerikansku fyritøkunum, sum eru skrásettar á partabrævamarknaðinum, er ov lítil samanborin við kursvirðið.

Danske Bank sigur, at tey amerikansku partabrøvini eru alt ov dýr, og sjálvt um kursurin er lækkaður nakað síðani ársskiftið, eru tey framvegis alt ov dýr samanborið við vinningin hjá fyritøkunum. Tí mælir bankin sínum viðskiftafólkum til at keypa evropeisk partabrøv, ætla tey at seta sínar pengar í partabrøv.

## Flyta inn

Kanningar vísa, at danir hava ongantíð keypt so nógv rúsdrekka sunnan fyri týska markið sum nú. Í fjør seldu handlarnir sunnan fyri markið 88 prosent meiri av whiskey, vodka og cognac. Árið fyri var vøksturin 27 prosent.

Fleiri danskir politikarar hava skotið upp at lækka avgjøldini á rúsdrekka í Danmark, men stjórnin sigur nei.

UTTAN ÚR HEIMI

# Bin Laden framvegis á lívi



Amerikanska herleiðslan ásannar, at yvirgangsleiðarin Osama bin Laden framvegis er á lívi, men hvar hann er, veit hon ikki
Mynd: Reuters

**-Hóast vit hava roynt at beina fyri honum, kenni eg meg rættiliga sannførdan um, at Osama bin Laden framvegis er á lívi, sigur ovastin fyri amerikansku herleiðsluni, Richard Myers, generalur**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Í samrøðu við amerikanska sjónvarpið Fox segði generalurin, sjálvandi er tað ikki óhugsandi, at yvirgangsleiðarin er deyður, men sjálvur kendi hann seg rættiliga vísan í, at Osama bin Laden framvegis er á lívi.

Richard Myers kendi seg samstundis vísan í, at fyrr ella seinni fer tað at eydnast USA at fáa fatur á bin Laden.

- Men hann er ikki tann einasti, sum vit leita eftir, tí hann hevur nógvar medarbeiðarar, sum vit eisini vilja hava fatur á, legði herovastin afturat.

Samstundis er tað vorðið týðiligt, at amerikanararnir og teirra sameindu vita ikki, hvar bin Laden er. Sunnudagin skrivaði New York Times, at hann fjalir seg onkunstaðni har eysturi í Afghanistan, men sama dag skrivaði bretska blaðið Daily Telegraph, at bin Laden fjalir seg hjá einum víðgongdum muslimskum felagsskapi í indiska partinum av Kashmir. Blaðið visti eisini at siga, at servandir amerikanskir og bretskir hermenn leita eftir honum har.

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, segði so seint sum í gjár, at fyri amerikanarar er tað avgerandi at tryggja, at bin Laden ikki kann stýra felagsskapi sínum al-Qaeda.

Altjóða serfrøðingar í yvirgangi hava fyrr sagt, at al-Qaeda kann leggja ætlanir um yvirgang og fremja tær, sjálvt um boðini ikki koma frá bin Laden.

# Hópdrápsmaður heiðraður

**Nógvir ísraelsmenn mintust sunnukvøldið Baruch Goldstein, sum fyri átta árum síðani drap 29 palestinar, sum lógu á knæ og bóðu í einari mosku**

Minningarhaldið var tætt við ein minnisvarða, sum varð avdúkaður fyri nøkrum árum síðani til minnis um Baruch Goldstein. Tann 25. februar í 1994 tók hann maskinbyrsu sína og fór hann inn í Ibrahim-moskuna í Hebron, har hann skjeyt 29 palestinar, sum hildu morgunbøn.

Tilburðurin er ikki gloymdur. Undir minningarhaldinum sunnukvøldið fagnaðu fólk Goldstein, sum tey søgdu vera eitt halgimenni, tí tað, sum hann gjørdi fyri átta árum síðani, var ein heilag gerð.

- Mál okkara er at heiðra Goldstein lækna og ikki at niðurgera hann, eins og tey á vinstravonginum gera. Goldstein er eitt halgimenni, segði Itamar Ben-Gvir, sum var ein av fyrireikarunum til minningarhaldið.

Stutt haðani mintust palestinar eisini dagin fyri átta árum síðani. Har var eingin fagnaður, og fólk svóru at hevna tað, sum Goldstein gjørdi.

- Vit hava einki gjørt teimum. Tey komu til moskuna og myrdu menn okkara, júst sum teir bóðu morgunbøn. Tey hava tikið alt frá okkum, og so rópa tey okkum yvirgangsmenn. Hendan dagin gjørdu vit ikki annað enn at biðja. Kunnu vit, fara vit at beina fyri teimum øllum, segði ein 30 ára gomul palestinsk kvinna. Faðir hennara var ein av teimum 29, sum Goldstein drap í moskuni.

Baruch Goldstein, sum framdi hópmorðið í 1994, var føddur og uppvaksin í USA. Hann var útbúgvin lækni. Sambært einari bók, sum kom út fyri nøkrum árum síðani, helt hann, at palestinar kúgaðu ísraelsmenn, og hann dugdi ikki at skilja, at ísraelsku hermenninir bert hugdu at og lurtaðu, tá palestinskir ungdómar róptu ókvæmisorð eftir teimum. Tann 25. februar í 1994 gjørdi hann av at taka málið í egnar hendur.

Úr Norðurlondum:
## Eingin royking

Læknafelagið í Noregi vil nú hava myndugleikarnar at banna sjúkrahúskioskunum at selja sigarettir. Læknafelagið vísir á, at hóast flestu sjúkrahúsini siga seg vera roykfrí, kunnu fólk keypa sær sigarettir í kioskunum á hesum somu sjúkrahúsunum.

Talsmaðurin hjá læknafelagnum vísir á, at tá kioskirnar kunnu selja sigarettir inni á sjúkrahúsunum, kunnu fólk fáa ta fatan, at tað man vera í lagi at roykja, hóast hagtølini vísa, at 7.500 norðmenn doyggja av royking á hvørjum ári.

Tí vil læknafelagið hava myndugleikarnar at banna sjúkrahúskioskunum at selja sigarettir.

## Aftur stríð

Danski kirkjumálaráðharrin, Tove Fergo, er aftur komin í andglettin. Stutt fyri ársskiftið bleiv hon óklár við landsins biskuppar um ta nýggju sálmabókina, sum er í gerð. Ósemjan endaði tó við semju eftir ein kreppufund í kirkjumálaráðnum, men nú er aftur kuril á tráðnum.

Sambært semjuni játtaði Tove Fergo at halda fund við allar biskupparnar, tá sálmabókin varð liðug, men nú vil hon kortini ikki hitta allar ísenn. Ráðharrin sigur, at danska fólkakirkjan er ikki ein biskupakirkja. Biskupparnir hava hinvegin hug at siga, at Tove Fergo er í ferð við at gera kirkjuna til eina ráðharrakirkju.

## Út á netið

Svenska løgreglan hevur mælt politikarunum til at broyta verandi lóg, so løgreglan kann fáa heimild til at kunngera navn og mynd av brotsmonnum á internetinum. Uppskotið verður nú viðgjørt í stjórnini. Amerikanska samveldisløgreglan FBI nýtir longu mannagongdina við internetinum.





*Beinta Clothier spælir aðra av teimum báðum konunum, sum fáa ein ógvusliga hvøkk*



*Stanley og John, alias Ronni Poulsen og Hallur Hjalgrímsson*

# Renn fyri vívinum, flenn í kíki

**Láturin steðgaði mestsum ikki, tá Havnar Sjónleikarfelag og Spírar høvdu Renn fyri vívinum á skránni fyri fyrstu ferð**

UMMÆLI
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Sára Svartá*

Renn fyri vívinum er eitt hugtak, ið hjá mongum hevur fingið ein nýggjan týdning eftir at hava vitjað Sjónleikarhúsið í Havn. Leygarkvøldið var fyrsta sýningin spæld fyri innbodnum í Sjónleikarhúsinum.

Leikurin snýr um tað heldur øðrvísi tilveruna hjá hýruvognsførarinum John Smith. Hann hevur nevniliga einki minni enn tvær konur, ið hann goymir burtur í hvør sínari íbúð, og eingin teirra hórar nakað ilt. At hava tvinnar konur krevur nógva og gjølla planleggingin, sum hóskar væl til yrkisleiðina hjá John. Í einum óhepnum óhappi kemur ólag í tíðarætlanina hjá John, og ólukkuliga kemur hann til at uppgeva báðar sínar bústaðir. Her frá er leikgongdin tann reini ruðuleiki, har eitt sindur av hvørjum hópar seg upp, og tað gongur ikki stillisliga fyri seg.

Leikurin er nógv merktur av teirri nógvu ferðini. Leikararnir reika runt á pallinum sum stóð heimurin á høvdinum. Replikkirnar flúgva runt á pallinum frá einum leikara til annan við øgiligari ferð. Sum tað eisini ofta er í einum tílíkum glantrileiki veksur ferðin og ruðuleikin ekspansivt gjøgnum leikin. Tilgjørdi veruleikin hjá tí heldur sermerkta hýruvognsførarunum gerst støðugt meira fløktur, og svarið á spurninginum, um hvør var hvør og hvar, verður allatíðina endurnýggja.

Tað varð sagt undan leikinum, at tú skal hyggja eftir leikinum fyri moralin í leikin, og hetta kundi ein og hvør sannað, eftir leikurin var liðugur. Hald teg til eina konu eru ráðini. Tað skal eisini sigast, at leikurin ikki er nøkur minnilig søga, ið verður liggjandi innanborða í longri tíð. Leikurin stílar eftir at vera skemtiligur, og tað er hann eisini. Tú flennir veruleikanum í kíki, og Sjónleikarahúsið livdi veruliga, tá ørskapurin á pallinum fekk smílibondini at toyggja seg. Leikurin er eisini stuttligur frá byrjan. Byrjan á ruðuleikanum gerst eisini byrjanin til láturin, sum eisini javnt og samt heldur fram til leikurin endar.

Evnini eru sex, bøssar, bigami og eitt sindur meira av tí fyrsta. Í so máta er leikurin eisini rættliga nýtmótans. Tað er stuttligt at flenna at tí veruliga bøssanum, tí uppdiktaða skápsbøssanum og øllum hinum, vit knýta afturat hesum. Leikurin leggur heldur ikki fingrarnar ímillum og nýtir hesi í føroyskum høpi meira djarvnu evni til fulnar, og hetta er eisini eitt av tí, ið heldur leikinum. Tað ber til at flenna hesum, og bara sjónin av samkynda grannanum fekk desibellini at rúka upp millum áskoðarnar, ið ung sum eldri flentu tað, tey áttu.

Meira tú setir teg niður at hugsa um søgugongdina eftir leikin, gerst hon meira og meira minniment, men tað er ikki við hesum fyri eygað, at tú skalt seta teg í stólin í Sjónleikarhúsinum.

Tær áttá leikararnir eiga rós uppiborna fyri gott samanspæl. Leikurin er samansettur av átta ymsum typum, ið sum leikurin gongur fara at líkjast meira stereotypum. Har er tað serliga leiklutirnir hjá teimum konunum, ið gerst ov einstáttað í longdini. Tað sama er galdandi fyri løgreglumenninir, sum tó báðir sleppa rímiliga væl frá avrikunum. Við bøssanum er tað jú tað, at hann er bøssi og sær út sum ein bøssi, og hetta er stuttligt. Leikliga stendur Hallur Hjallgrímsson seg sera væl sum tann nógv uppbidni hýruvognsførarin. Hann er miðpunktið í leikinum, og tað ber ikki til at siga annað enn, at hansara sjónleikaraevni eru framúr.

Eisini eiga bæði leikskrá og pallur at fáa rós. Ein serlig rós fer eisini til handritið, ið tekur enska humorin og dagliga til Føroya í heilum líki.

F.A.H.O.F. Farið at hyggja og flenni.



*Barbara, Kristina S. Ougaard, dugir væl at handfara mannligu løgreglumenninar*



*Salurin brast útúr at flenna, tá Heðin Johannesen kom á pallin sum tann samkyndi grannin*